# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt løgið álvarsmál

Málið um fangatøkuna av Skálabergi og gíslatøkuna av manningini man vera eitt tað løgnasta og mest óhugnaliga álvarsmálið í Føroyum í mong ár. Fyrst varð skipið tikið fyri ikki at hava øll síni pappír í ordan fyri síðani at fáa so grovar ákærur, at man skuldi trúð, at her varð talan um krígslíknandi støðu.

Í byrjanini varð hildið, at talan var um eina vanliga sak, har reiðarí av onkrari orsøk ikki hevði øll pappír í lagi og um væntandi dialog millum myndugleikar rundan um eina fráboðan, at Skálaberg fiskaði kvotuna hjá Sundabergi. Eini minni bót mundi vera svarið varð hildið.

Hetta eskaleraði tó tá russiska ákæruvaldið bráddliga vildi leggja hald á skip og veiðu umframt at krevja stóra bót. Mundi russisk mafia standa aftanfyri vóru gitingarnar. Í gjár kom so dómurin, ein bót uppá fimm milliónir krónur.

Málið um Skálaberg hevur givið føroyska samfelagnum ein skelk og nakað at hugsa um. Hvussu kundi tað bera til, at risatjóðin Rusland, ið sum heild hevur verið væl viðfarin av føroyingum, hóast undantøk, helt manning og skip í fangilsi í so drúgva tíð! Hetta eru spurningar, sum standa eftir, nú dómur er avsagdur. Spurningar, sum hava stóran týdning fyri framtíðina, tá bæði londini skulu til at tingast um nýggjar sínámillum fiskiveiðisáttmálar.

Í áhugaverdari sending í Kringvarpinum mánakvøldið tók ein av royndu fiskimonnunum á Skálabergi til orðanna ímóti at endurnýggja sáttmálan við russar. Atburðurin hjá russum í aktuella málinum varð helst orsøkin til, at hannn varð so avgjørdur men kjarnin var meira tann sannroynd, at russar fáa nógv meira burtur úr sáttmálanum enn vit. Hann nevndi tøl, sum siga, at russar fáa eitt virði uppá 1 mia. krónur, meðan okkara bara er góðar 300 mill. kr. Um hetta er veruliga støðan, so eiga okkara myndugleikar sjálvandi at venda øllum í tí sáttmála, sum eftir ætlan skal endurnýggjast.

Føroyar hava ikki brúk fyri at liggja í framhaldandi stríði við russiska samfelagið. Tað hava vit hvørki ráð ella rætt til. Hava vit gjørt mistøk, mugu vit sjálvandi bøta fyri tey. Men framferðin hjá russum í hesum máli eigur at enda við, at russiska stjórnin kemur við eini umbering og kannar, hvat gekk galið í teirra egnu burokratisku valdsskipan. Vit mugu fáa trygd fyri, at slíkt ikki endurtekur seg. Hvussu kunnu føroysk reiðarí hereftir kenna seg trygg at senda síni skip í russiskan sjógv!

Tað liggur stór ábyrgd á føroyskum myndugleikum at fáa reinsað luftina og tryggja, at vit fáa normal viðurskifti við Rusland í framtíðini. Vit mugu ikki generalisera og enn minni taka til hevndarvápnið. Tørvur er á einum spildurnýggjum dialogi við Rusland. Latið okkum taka hann upp í kjalarvørrinum á hesum óhepna máli. Og lat okkum brúka allar góðar kreftir, eisini russiska konsulin í Føroyum, sum við sínum dúgvu royndum hevur gjørt so nógv fyri at byggja brýr og menna samvinnuna millum tjóðirnar báðar.

**Sosialurin**

## Rættleiðing til tíðindi um ítróttarhøll í Sandoynni



**JÓAN PETUR HENTZE**
Aðalskrivari Kommunusamskipan Føroya

Kringvarp Føroya hevur í tíðindasending og á heimasíðuni 17. desember 2009 borið tíðindi um sjónarmið hjá Kommunusamskipan Føroya í sambandi við uppskot til løgtingslóg um at byggja ítróttarhøll í Sandoynni.

Av tí at tíðindini blanda eina átalu, ið Kommunusamskipanin gav Mentamálaráðnum um stuttu hoyringsfreistina, saman við sjálvt uppskotið um at byggja ítróttarhøll í Sandoynni, kunnu tíðindini lættliga misskiljast og geva fatan av, at Kommunusamskipanin er ímóti ætlaðu ítróttarhøllini.

Kommunusamskipanin skal tí koma við hesi stuttu rættleiðing.

Sum tað eisini framgongur av hoyringsskrivinum, so staðfestir Kommunusamskipanin, at uppskotið um at byggja ítróttarhøll í Sandoynni er ein økispolitisk ætlan, sum landið sum serskipan og sum undantak hevur sett sær fyri.

Kommunusamskipanin ivast heldur ikki í, at ítróttarhøllin er kærkomin fyri Sandoynna og verður til stórt gagn fyri sandoyingum.

Viðvíkjandi hoyringsmannagongdini hjá landsstýrinum, so er tað tíverri vorðið heilt vanligt, at hoyringspartarnir – eitt nú kommunur – ikki fáa nakran veruligan møguleika at viðgera uppskot til lógir og kunngerðir nøktandi, tí at tíðarfreistin er órímiliga stutt.

Hetta er ein stórur fólkaræðisligur trupulleiki, sum bert tykist vaksa.

## Bøðil, flyt meg úr heimi



**TÓRBJØRN JACOBSEN**

Ein valdsins metamorfosa hertók løgtingið ídag. Tað eydnaðist stutt fyri evsta mark landsstýrinum í fyrsta umfari at smoyggja eitt spildurnýtt fíggjarlógaruppskot niður yvir høvd og herðar á nýggja meirilutanum í fíggjarnevndini, ið var fullmannað við lýdnum atkvøðutrællum, nú búskaparfrøðingurin, fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin og politikarin Magni Laksáfoss var komin at sínum samvitskumørkum. Hansara meting um framtíðina, við verandi búskapargongd, var greið í útvarpinum í kvøld. Politisku bremsuklossarnir eru slitnir niður í nakka, vognurin akar fyrilitarleyst, nú bíða vit bara eftir undirdýpinum, um politikkurin hjá hesi samgonguni verður ráðandi leingi afturat. Nýggja og ikki íligna fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrinum varð blástemplað, og er nú galdandi frá tí at lógin er lýst at fáa fullan virknað frá árskiftinum komandi.

Fyri Eysturoynna sum lokaløki gjørdist hendan avgerðin um eina fíggjarlóg ein vanlukka. Landsstýrið hevði nevniliga valt at útradera íløgurnar í vegagerð í Leirvík og í Skálafirði, og hartil var ætlaði nýbygningurin til havrannsóknir sveipaður burtur í einum høggi. Eftir standa 3,5 mió. kr. til Rituvíksvegin. Samlaði íløgukarmurin var upprunaliga 317 mió. kr. Nú er hann barberaður við 137 mió. kr. og av teimum eftirverandi 180 mió. kr. eigur Eysturoyggin einans 3,5 mió. kr. ella sløk 2%. Serliga pírið er hetta, táið millum fimting og fjórðing av fólkinum býr og virkar í hesum øki. Táið vit hartil vita, at 5 av 20 samgongumonnum búgva í økinum, man hetta vera lakasta lokalpolitiska telving í mannaminni. Ritvíksvegurin er ikki annað framhald av tí, sum vit báðir Bill telvaðu okkum fram til í fíggjarnevndini fyri ári síðani.

Vit vóru nakrir sum lógu tvíbuktaðir til seinastu stund í tinginum ídag. Royndu alt hvat vit kundu fyri at fáa upprunaupphæddirnar innaftur á fíggjarlógina. Bæði í Leirvík, í Skálafirði og til havrannsóknarskipið, sum mest sannlíkt skuldi smíðast inni á Skála. Men tað var sum at sláa í eina dýnu, sum at sletta vatn á gás, ikki so frægt at menn vikaðust fram til røðarapallin, fyri at greiða frá íkomuni til hesa vitleysu miseru fyri oynna. Menn sum annars eru reystmæltur, táið mál av minni týdningi eru til viðgerar.

Avloysarin hjá Magnusi Heinasyni varð torpederaður á tingi ídag. Nú liggur hann sokkin í politisku skipanini, í hvussu er soleingi hetta vanlukkuliga regime situr. Tríggir føroyskir entreprenørar hava annars tikið seg saman í eina partalagssátt fyri at gera detailprosjektering, innheintan av tilboðum og kostnaðarmetingar fram til ein endaligan læstan kostnað, soleiðis, at allir partar tá kundu taka støðu til um verkætlanin skuldi fremjast í verki ella ikki. Hetta kundi gerast fyri 5 mió. kr., men heldur ikki uppskotið um hetta, á tingi ídag, vann frama, og forðaði hetta tí fyri, at farið kann vera undir sjálvt skipasmíði í 2011. Málið var nú ikki størri enn tað, at hetta kundi verið klipt burturav ódefineraða íløgulummanum hjá Kalsbergi og Eidesgaard á 26 mió. kr., sum av politiskum trygdarávum ikki skal ásetast til tunlarnar Norð um Fjall fyrrenn í januarfebruar mánaða í 2010.

Ikki sørt at hetta gevur accosiatiónir til ein tann vakrasta sangin yrktur er føroyingum. Deyði Magnus Heinasonar, sum Hargarskaldið Pól F. setti saman um hendan merkismann. Seinasta ørindi er soljóðandi:
”Bøðil flyt meg úr heimi,
eg vamlist at liva her, hvar trælir seg sleikja til valdið,
eins og nú Valkendorf ger;
øll míni brøgd og roysni,
Føroyingum vígdi eg.
Føroyar farvæl, mín móðir,
eydnan signi tín veg.”

Við køldum kenslum niður eftir bakinum, um tað skotið fyri bógvin, sum føroyskar havrannsóknir hava fingið ídag, eru hesi harmaljóð skrivað á fyrstu ferð míni til Jorsala. Gleðilig jól øll somul og mátti Harrin signað tykkum árið, sum nú er í heinta.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.